LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Tórshavn: 17. september 2020
J. nr.: 0605-010/20-47
Viðgjørt: KTH

Ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Dátueftirlitinum, Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu, Kommunufelagnum, Vinnuhúsinum, Føroya Tele, Hey, SPEKT, Formula, Januar, Elektron, Trygdartøkni, Tunnil, Vága Floghavn, Atlantic Airways, Bank Nordik, Betri, Norðoyar Sparikassa, Suðuroyar Sparikassa, Føroya Politi og Føroya Rætti.

Lógaruppskotið hevur harumframt ligið á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Hesi hava svarað: Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið, Dátueftirlitið, Kommunufelagið, Vinnuhúsið, Elektron, Trygdartøkni, Atlantic Airways, Bank Nordik, Betri og Føroya Politi.

Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Fiskimálaráðið, Kommunufelagið, Vinnuhúsið, Atlantic Airways, Bank Nordik, og Føroya Politi hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

Dátueftirlitið vísir á, at tað er rættast, at tað er Dátueftirlitið, sum fakkunnleiki á økinum og ikki landsstýrismaðurin, sum saman við politinum skal geva loyvi til at yvirvaka, sbrt. § 4.

Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at orsøkin til, at politiið kann taka hesar avgerðir í samráð við landsstýrismannin er, at tað í spurninginum um vakmyndatól skal setast upp m.a. skal taka atlit til vernd av persónupplýsingum og persónliga frælsi hjá tí einstaka. Landsstýrismaðurin kann í hesi meting venda sær til fakkunnleikan (t.d. Dátueftirlitið) um tørvur er á tí. Tað kunnu tó – umframt atlitini til verju av persónupplýsingum – eisini verða onnur atlit, sum landsstýrismaðurin skal taka við, og sum politisk støða møguliga skal takast til.

Dátueftirlitið er av teirri fatan, at strikingartíðin á 30 dagar í § 8, stk. 2 er ov long. Dátueftirlitið eftirlýsir eina nærri grundgeving fyri hesum, undir hesum eina serføroyska tørvsmeting, fyri at lýsa um tørvur er á 30 døgum at strika.

Løgmansskrivstovan er av teirri fatan, at tá talan er um yvirvøku fyri at fyribyrgja lógarbrotum, eru 30 dagar ein passandi freist. Í hesi meting eru atlitini til tey, sum eru á upptøkunum, vigaði ímoti atlitunum til tann, sum yvirvakar og møguleikarnar hjá politinum at avdúka lógarbrot. Freistin á 30 dagar svarar m.a. til rættarstøðuna í Danmark.

Dátueftirlitið vísir á, at leikluturin hjá Dátueftirlitinum eftir løgtingslógini er ógreiður. Dátueftirlitið mælir til, at Dátueftirlitið skal hava eftirlit við løgtingslógini.

Í §§ 5 og 6 er ásett, at viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram við vakmyndatóli, er fevnt av dátuverndarlógini.

Leikluturin hjá Dátueftirlitinum er lýstir í § 9. Her er ásett, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum sbrt. § 8 (um víðarigeving og striking). Harumframt er ásett, at vakmyndatól skulu fráboðast Dátueftirlitinum.

Henda skipanin merkir í stuttum, Dátueftirlitið einans hevur eftirlit við um § 8 verður fylgd. Orsøkin er, at § 8 er ein serlig áseting um viðgerð av persónupplýsingum, sum náturliga eigur at liggja hjá Dátueftirlitinum at halda eyga við.

Skipanin hevur við sær, at Dátueftirlitið ikki hevur eftirlit við um t.d. §§ 1, 2 og 3 verða fylgdar. Dátueftirlitið skal t.d. ikki geva loyvi til vakmyndatól.

§§ 5 og 6 hava við sær, at tað verður gjørt púra greitt, at viðgerð av persónupplýsingum við vakmyndatóli er fevnt av dátuverndarlógini. Hetta hevði verið galdandi hóast §§ 5 og 6 vóru strikaðar, tí at virkisøkið í dátuverndarlógini er breitt og ikki skilir ímillum tólini, sum viðgera persónupplýsingar.

Í praksis merkir hetta, at um Dátueftirlitið hevur eftirlit við einari fyritøku – fyri at tryggja at reglurnar í dátuverndarlógini verð fylgdar – og henda fyritøka hevur vakmyndatól, skal Dátueftirlitið hava eftirlit við um § 8 í vakmyndatólslógini verður fylgd, umframt at hava eftirlit við um dátuverndarlógin verður hildin í sambandi við viðgerðina av persónupplýsingunum.

Um fráboðanarskylduna í § 9, stk. 2 í uppskotinum, mælir **Dátueftirlitið** til, at hetta verður nágreinað til eina "nøktandi fráboðan", sum umframt at upplýsa, hvar vakmyndatólið er sett upp, skal fevna um skíggjamynd, endamálið við uppsetingini, strikingartíð og trygdarfyriskipanir. Eisini vísir Dátueftirlitið á, at tað eigur verða greitt frá í viðmerkingunum, hvat Dátueftirlitið skal gera um krøvini til fráboðan ikki eru lokin. Dátueftirlitið mælir til, at heimild verður sett í lógaruppskotið, so landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvat fráboðanin skal innihalda.

Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at tað ikki er lagt upp til eina loyvisskipan. Hetta er í samsvari við skipanina í dátuverndarlógini, sum kemur í gildi 1. januar 2021. Ein loyvisskipan – ella skipan við nøktandi fráboðan – er ein umsitingarlig tung skipan, sum tað ikki er mett skynsamt at halda fram við.

Tað er upp til tann, sum setur vakmyndatólið upp (fyritøkuna ella almenna myndugleikan), at tryggja sær, at viðkomandi fylgir øllum galdandi reglum í bæði vakmyndatólslógini og dátuverndarlógini.

Í mun til yvirvøku av starvsfólkum spyr **Dátueftirlitið** eftir eini størri umrøðu av arbeiðsrættarligum viðurskiftum í mun til vakmyndatólsyvirvøku av starvsfólki.

Í uppskotinum er greitt frá, at tað kunnu verða reglur og grundreglur í arbeiðsrættinum, sum hava við sær avmarkingar í møguleikanum hjá arbeiðsgevarum at yvirvaka starvsfólk, og har

sum serlig fyrivarni tí skulu takast. Løgmansskrivstovan metir ikki, at tað í hesum lógaruppskotinum skal greiðast nærri frá arbeiðsrættinum.

Dátueftirlitið mælir til, at tað verður nágreinað í viðmerkingunum um "dash-cams" eru fevnd av forboðnum í § 2.

Løgtingslógin fevnir um yvirvøku við vakmyndatóli, sum skal skiljast sum skipað ella regluliga endurtakandi yvirvøka av persónum við fjarstýrdum ella sjálvvirkandi vakmyndatóli, myndatóli ella líknandi. Tá tað kemur til dash-cams kann spurnartekin setast við, um talan er um skipaða ella regluliga endurtakandi yvirvøku.

Løgmansskrivstovan metir ikki, at tað skal takast beinleiðis støða til hetta ítøkiliga máli í viðmerkingunum.

Dátueftirlitið viðmerkir, at tað møguliga hevði verið gagnligt um uppskotið reguleraði ella bannaði nýtslu av eftirgjørdum vakmyndatólum (attrappum).

Løgmansskrivsstovan tekur undir við, at vakmyndatólsattrappir kunnu hava sama atferðarregulerandi virkna, sum vakmyndatól, sum taka upp. Sum skilst á t.d. Trygdartøkni, sum seta vakmyndatól upp, eru attrappir ikki vanligar í Føroyum. Av hesi orsøk hevur Løgmansskrivstovan ikki broytt uppskotið, soleiðis at vakmyndatólsattrappir eru fevndar av.

Elektron vísir á, at tað hevði verið ynskiligt um møguleiki var at søkja ein almennan stovn um loyvi at goyma upptøkur longri enn 30 dagar, av tí at tað kann verða trupult at uppdaga óreglusemi innanfyri hetta tíðarskeið.

§ 8, sum í stk. 2 hevur eina freist á 30 dagar at strika upptøkur, fevnir einans um yvirvøku við tí endamáli at fyribyrgja lógarbrotum. Hetta hevur við sær, at um endamálið við upptøkuni er eitt annað, t.d. eftirlit við eini maskinu, so framleiðsla gongur sum hon skal, skal víðarigeving – um persónupplýsingar eru á upptøkuni – metast eftir vanligu reglunum um viðgerð av persónupplýsingum í dátuverndarlógini.

Løgmansskrivstovan er av teirri fatan, at tá talan er um yvirvøku fyri at fyribyrgja lógarbrotum, eru 30 dagar ein passandi freist. Í hesi meting eru atlitini til tey, sum eru á upptøkunum, vigaði ímoti atlitunum til tann, sum yvirvakar og møguleikarnar hjá politinum at avdúka lógarbrot. Freistin á 30 dagar svarar m.a. til rættarstøðuna í Danmark.

Trygdartøkni vísir á, at tað er ógreitt, hvussu fráboðanin eftir § 9, stk. 2 skal fara fram, undir hesum hvør leikluturin hjá Dátueftirlitinum er. Um spurningin um kameraattrappir upplýsir Trygdartøkni, at hesi hava verið á marknaðinum leingi, men ikki eru nógv at síggja í Føroyum.

Sambært viðmerkingunum skulu upplýsingar latast Dátueftirlitinum, so tað er púra greitt, hvar vakmyndatólið er sett upp og hvat upptøkan fevnir um. Hvussu hetta skal gerast í praksis – um tað skal vera ein uppringing, teldupostur ella bræv – verður til Dátueftirlitið at gera av, soleiðis at umsitingin hjá teimum av fráboðanarskipanin verður løtt. Møguliga kundi talan verið um eina elektroniska loysn ígjøgnum heimasíðuna.

Sí annars omanfyri svarið til viðmerkingina frá Dátueftirlitinum um fráboðanir.

Betri vísir á, at í donsku lógini verður "pengeinstitutvirksomheder" nýtt, og fevnir hetta um "banker, vekselkontorer og posthuse, der fungerer som ekspeditionssted for pengeinstitutter i relation til samme type virksomhed". Í § 3 í uppskotinum verður víst til "pengingastovnar". Spurt verður eisini um, hvørt húsarannsókn í § 10 fevnir um tað sama, sum ransagning á donskum.

Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at lagt er upp til, at § 3, nr. 3 í uppskotinum skal hava sama virkisøki, sum samsvarandi áseting í donsku lógini. Sambært Sprotanum er "peningastovnur" eitt felagsheiti fyri bankar og sparikassar og orðið fevnir tí ikki um júst tað sama sum "pengeinstitutvirksomheder". Fyri at tryggja, at ásetingin í § 3, nr. 3 fevnir tey støð, har peningsstovnsvirksemi fer fram verður "o.tíl." lagt afturat aftan á peningastovnar í § 3, nr. 3. Eisini verður greitt frá hesum í serligu viðmerkingunum.

Húsarannsókn sambært § 10, stk. 6 fevnir einans um húsarannsókn eftir reglunum í kapitul 86 í rættargangslógini fyri Føroyar, sum kemur í gildi 1. januar 2021. Hetta er nágreinað í viðmerkingunum.